# Lippur eru ein luksusvøra

**Á Kósini standa menn og skera lippur við hond hvønn dag til tann spanska marknaðin. Eftirspurningurin er stórur, og sum er verður marknaðurin ikki mettaður**

FISKIVINNA

*Solby A. Eliasen*

– Vit skera so nógv, sum vit kunnu, sigur Klæmint Hansen, sum er framleiðsluleiðari á Kósini. Og tað hevur verið arbeitt út í eitt, síðani tað byrjaði seinasta heyst.

– Vit kenna onki til steðg, sigur Klæmint, sum tó ásannar, at tørvurin als ikki verður nøktaður sum er. Alt verður selt og fer avstað so hvørt. Og bara til tann spanska marknaðin. Framferðsluhátturin er einkul, men Klæmint sigur, at tað er nógv arbeiði av tí, og tað kostar nógv í løn.

– Tað er avmarkað, hvussu nógv kemur burtur úr einum tíma, tí tað er jú bara ein lippa fyri hvønn fiskin, sigur hann. Og menninir verða tímaløntir, men Klæmint viðgongur, at tað loysir seg væl, kortini. Prísurin er avbera góður, hann plagar at liggja um 60 krónur fyri kilo.

– Annars høvdu vit ikki fingist við hetta.

Hann sigur, at tey byrjaðu í smáum við at skera lippur og kjálkar til spanska marknaðin einaferð seinasta heyst. Men hetta hevur vundið skjótt upp á seg, og í dag verða millum 500 og 1.000 kilo skorin um vikuna, alt eftir hvussu nógvur fiskur er. Ein lippa er ikki nógv av einum heilum fiski, og tað verður mett at vera ein delikatessa í Spania. Fólk eta sum oftast eina lippu við at koyra hana alla í munnin í einum, so tað skulu nógvar lippur til fyri at koma upp á 500 kilo ella meira.

Tær verða skornar og pakkaðar í 10 litur spannir og sendar á spanska marknaðin.

Tað er bara toskur, sum verður nýttur, tá menn skera lippur. Og bara toskur, sum liggur um tey trý kiloini ella minni. Av tí størra toskinum skera menn kjálkar og sokallaðar faces. Tað er kjálkarnir báðar saman við lippuni hangandi uppií.

Á Kósini eru maskinir til at skera kjálkar og faces, men lippurnar verða skornar við hond.

Beint nú skera tey bara lippur, tí at ymiskar umrokeringar verða gjørdar á virkinum. Men linjan við kjálkunum verður sett uppaftur skjótt, og tá verður so hildið fram aftur at skera kjálkar og faces.

Lippur og kjálkar eru nakað, sum føroyingar eisini eta nógv av, og tí hava menn ofta tikið til síðis høvd til privata nýtslu og skorið sjálvir. Men tað er farið í søguna nú, tí virkini, sum skera kjálkar og lippur, hava boðað frá, at tey keypa allan fiskin.

– Tað var ein trupulleiki at byrja við, men tað er tað ikki longur, sigur Klæmint Hansen. Hann sigur eisini, at tað kann vinnast nógvur peningur burtur úr hjávøru sum til dømis lippur og kjálkar.

Tað verður alt meira satsað upp á hjávøruna eisini, tí tað er sjálvandi best at so nógv sum møguligt verður selt av fiskinum.

Teir fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár, hevur Kósin selt fyri eina millión í hjávøruni.



*Tað gongur skjótt fyri seg hjá teimum, og teir skera millum 500 og 1.000 kilo um vikuna*



*Teir eru vanliga fýra menn, sum standa og skera lippur hvønn dag*



*Prátið gongur lívliga, meðan menn arbeiða og dúgliga verður skemtað*




*Í hesum spannunum verða lippurnar sendar á spanska marknaðin. Spannirnar taka 10 litrar hvør*




